# Trygdarfreistin útsett

**Sjómenn hava nú restina av árinum til at taka trygdarskeið. Æltaða freistin 1. apríl er útsett, og tað fegnast leiðarin á Trygdarmiðstøðini um**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Allir sjómenn, sum skulu mynstra við føroyskum skipum, skulu í framtíðini hava trygdarskeið fyri at sleppa til sjós.

1. apríl var freist sett fyri, at sjómenn skuldu havt tikið hetta skeiðið, men nú hevur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, útsett freistina til við árslok.

Nógvir hundrað sjómenn mangla framvegis at taka trygdarskeiðið, sum bara kann fáast á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík, og tað var við hesum í huga, at freistin varð útsett.

– Vit fegnast um, at vit og sjómenninir fáa longri skoðbráð til skeiðini, sigur Marius Magnusson, sum er leiðari á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík.

## Øktu ferðina

Síðani 1990 eru 3008 trygdarprógv útskrivað til sjómenn, men framvegis eru tað hópin av fólki, sum ikki hava tikið skeiðini.

– Vit hava 17 fólk á skeið hvørja viku, og fram til summarferiuna er skeiðini fullmannað. Harafturat standa eini 600 sjómenn á bíðilista til eftir summarferiuna, sigur Marius Magnussen.

Í fjør hevði Trygdarmiðstøðin í Klaksvík skeið aðruhvørja viku, men í ár hava skeið verið hildin hvørja viku fyri at seta størri ferð á.

Allir sjómenninir, sum mangla trygdarskeið, fáa ikki tikið tað í hesum árinum, tí so nógv pláss eru heilt einfalt ikki til taks.

Hvat so verður gjørt við árslok, tá sjómenn framvegis mangla trygdarskeið er ein spurningurin, sum politiska leiðslan skal taka sær av.

## Eitt fólk afturat

Tveir mans starvast á Trygdarmiðstøðini, men stovnurin samstarvar eisini við Sjómansskúlan og Tekniska skúla í Klakvík, og uttan hetta samstarvið hevði tað ikki borið til at havt skeið hvørja viku, sigur leiðarin.

Trygdarmiðstøðin hevur søkt eftir einum starvsfólki afturat, og um nakrar vikur verða tað tí ætlandi trý fólk í føstum starvi á stovninum.



*Trygdarmiðstøðin heldur til í hølum á Tekniska skúla í Klaksvík og í hesum bygninginum við bátahylin á Borðoyavík*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

Trygdarmiðstøðin heldur til í hølum á Tekniska skúla í Klaksvík og við bátahylin á Borðoyavík, har praktiskar royndir verða gjørdar.

## Øll sleppa inn

Seinastu vikurnar er bíðilistin støðugt vaksin, og fólk verða tikin á skeið so hvørt sum tey koma á listan.

– Vit kunnu ikki meta um, hvussu neyðugt tað er við trygdarskeiði hjá teimm ymsu fólkum – um onkur hevur meiri skund enn annar. Eru fólk yvir 15 ár og hava læknaváttar kunnu tey sleppa á skeiðið, og tey verða tikin inn í tí røð, sum tey melda til í, sigur Marius Magnusson.

Trygdarmiðstøðin í Klaksvík verður ikki uttan arbeiði, tá øll sjófólkini hava tikið trygdarskeið einaferð, tí ætlanin er at skeiðini skulu nýggjast eftir fimm ár.

# Bjóða arbeiðið út í apríl



*Nýggja krivjivirkið skal byggjast á økinum norðanfyri Roykivirkið.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Arbeiðið at byggja nýtt krivjivirki í Klaksvík skal eftir ætlan byrja um fáar mánaðir**

ALING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Um stutta tíð verður gongd sett á arbeiðið at byggja nýtt krivjivirki á vestara kaiøki í Klaksvík.

Tað eru alifyritøkurnar Faroe Salmon og East Salmon, sum skulu byggja virki.

Í januar mánaði játtaði Klaksvíkar býráð prinsipielt byggiloyvi til krivjivirki, og í løtuni verður tilfarið til útbjóðingina gjørt klárt. Í næsta mánaði verður arbeiðið boðið út.

## Økja virksemi

Faroe Salmon og East Salmon, sum bæði hava stórt alivirksemi í Norðoyggjum, samstarva sum er um krivjingina av laksinum, men feløgini vilja hava betri umstøður og størri orku.

Faroe Salmon hevur ætlanir at økja sína framleiðslu við fleiri túsund tonsum komandi árini, og tí er eisini brúk fyri størri orku til at taka laksin.

Nýggja krivjivirki verður góðar 2000 fermetrar til støddar, og tað fer at kosta umleið 30 milliónir krónur at byggja.

## Lítið pláss

Í sambandi við byggiloyvi til nýggja krivjivirki hevur verið tosað um, hvussu stórt virkið kundi verða, og hvar tað skuldi liggja á havnaøkinum fyri ikki at taka ov nógv frá nýggja byngjuøkinum.

Tá nýggja krivjivirkið er bygt, verður lítið pláss eftir á vestara kaiøki at byggja á, og Klaksvíkar býráð hevur viðgjørt spurningin um, hvat ætlanin síðani skal vera á havnaøkinum.

Hugskot eru at útbyggja vestara kaiøki norðureftir ella at gera meiri við nýggju góðshavnina í Ánunum – stutt norðan fyri Klaksvík.

# Brandur kom víðari

**Ungi sangarin, sum er kendur frá Kulum Rótum, kom víðari til finaluna í Ársins Songrødd**

SANGRØDD
*Eyðun Klakstein*

Annað innleiðandi umfarið í kappingin um at gerast Ársins Songrødd varð hildið í TB-húsinum á Tvøroyri leygarkvøldið.

Seks fólk høvdu teknað seg til kappingina í Suðuroy, men tá tað vóru bara fýra, sum vóru við í kappingini, tá samanumkom.

Guðrun Sólja Jacobsen, sum tvær ferðir áður hevur staðið seg væl í kappingini, vann umfarið í Suðuroy, og ungi og evnaríki sangarin, Brandur Enni, var nummar 2.

Brandur Enni er ein av sangarunum hjá teimum væl umtóktu Kulu Rótum.

## Seks innleiðandi umfør

Nú eru fýra luttakarar funnir til finaluna, sum verður 9. juni í Havn. Tveir sangarar úr Norðoyggjum og tveir úr Suðuroy eru nú klárir til finaludystin.

Næsta innleiðandi umfarið í songrøddkappingini verður í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið 31. mars. Í hesum umfarinum er fullteknað, og tað vil siga, at 10 fólk verða við.

Bara vinnarin kemur víðari frá hesum umfarinum, tí eitt eyka innleiðandi umfar verður í høvuðsstaðnum seinni, og har sleppur ein luttakari eisini við í finaluna.

Umframt høvuðsstaðin, skulu Eysturoy og Vágar eisini hýsa innleiðandi umførum í kappingini.



# Suðuroyingar krevja at fáa rætta skipið

**Suðuroyingar góðtaka ikki, at Bjarni Djurholm setir sakkunnleikan til viks, nú nýggjur Smyril skal byggjas**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Nýggja suðuroyarskipið, sum sakkunnleikin mælir til, er nógv betri enn tað, sum Bjarni Djurholm mælir til at byggja. Tað er eisini væl bíligari í rakstri, enn Smyril nú er. Verður tað bygt í Kina, kostar tað eisini minni enn tað, sum landsstýrismaðurin mælir til*

Nú nýggjur Smyril skal byggjast, fara suðuroyingar ikki at taka til takkar við einum einum skipi, sum ikki lýkur tær treytir, sum eitt nýmótans samfelag setir til til samferðslu.

Tað varð greitt á einum fundi, sum umboð fyri kommunurnar í Suðuroynni og umboð fyri vinnulívið í oynni høvdu mánakvøldið um ætlanina at byggja nýtt suðuroyarskip.

Orsøkin til fundin er, at nú hevur ivi tikið seg upp um, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið fer at síggja út.

Nevndin, sum hevur fyrireikað byggingina, mælir til at byggja eitt skip, sum siglur 21 míl. Men Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, mælir landsstýrinum til at byggja eitt skip, sum siglur 19 míl.

Á fundinum í Øravík varð einmælt samtykt at senda Bjarna Djurholm skriv, har kravt verður, at tilmælið frá fyrireikingarnevndini verður fylgt.

– Hetta er einasta loysnin, sum verður góðtikin í Suðuroynni, stendur í skrivinum, sum borgarstjórarnir, Jógvan Krosslá í Vági, Finnleif Guttesen á Tvøroyri, Emma Petersen í Hovi, Elin Nielsen í Fámjin, Eli Frederiksen úr Porkeri og Jacob Vesteraard í Sumbiar kommunu, hava skrivað undir. Borgarstjórin í Hvalba, Levi Niclasen, var ikki við á fundinum, men um telefonini boðaði hann frá, at hann tók undir við málinum.

Umframt politikararnar, hava vinnulívsmenninir Heri Hjelm, Tummas Thomsen, Bjarni Hansen, Viberg Sørensen og Mikkjal Sørensen, eisini skrivað undir brævið til landsstýrismannin.

Avrit av brævinum er sent øllum hinum landsstýrismonnunum og fjølmiðlunum.

## Ímóti sakkunnleikanum

Í brævinum verður víst á, at sakkunnleikin hevur mælt til at byggja eitt skip, sum siglur 21 míl. Og sakkunnleikin, tað er aldargamla danska projekteringsfelagið Knud E. Hansen, leiðslan á Strandferðsluni, manningin á Smyrli, umframt umboðini fyri vinnulívið og kommunurnar í Suðuroynni.

Hesin sakkunnleikin hevur arbeittt í hálvtannað ár við málinum. Tá ið Bjarni Djurholm so kortini mælir til eina aðra loysn, má tað tí metast sum ein undirmeting av sakkunnleikanum.

Skipið, sum sakkunnleikin mælir til, er einasta skipið, sum lýkur tey minstukrøvini, sum verða sett til samferðslu ímillum Suðuroynna og meginøkið nú og nógv ár fram í tíðina.

– Hetta er landsvegurin hjá suðuroyingum inn á meginøkið og er tí onki minni enn lívæðr okkara, siga suðuroyingar í skrivinum til Bjarna Djurholm og restina av landsstýrinum.

Tí verður staðiliga heitt á landsstýrið um at taka við teirri loysnini, sum sakkunnleimin sigur er tann rætta.

## Eitt heilt annað skip

Á fundinum í Øravík varð víst á, at munurin á skipunum, sum sakkunnleikin mælir til og sum siglur 21 míl, og skipinum, sum Bjarni Djurholm mælir til, og sum siglur 19 míl, er ikki bara, at tað fyrra skipið siglur eitt sindur skjótari.

– Talan er um eitt heilt annað skip. Skipið, sum siglur 21 míl gongur m.a. við tungolju og er tí bíligari í rakstri enn enntá Smyril nú er. Hetta skipið er eisini so mikið effektivt, at tað tekur ikki meiri enn 15-20 minuttir at fáa allar bilar og alt fólk íland og at fylla tað aftur, hetta tí, at tað hevur tvey hekkuportur. Hetta skipið er eisini longu teknað. Skipið er bygt í sama sniði sum verjuskipið Triton, ið er eitt tiltikið gott sjóskip.

Verður tilmælið hjá Bjarna Djurholm hinvegin fylgt, skal skipið, sum siglur 19 míl, teknast av nýggjum og tað kostar eyka. Tað gongur ikki við tungolju og er dýrari í rakstri.

Skipið, sum siglur 21 míl kostar 300 milliónir at byggja. Men tað er eisini upplýst, at tað kann byggjast í Kina fyri 255 milliónir. Tá er íroknað, at tveir mans frá projekteringsfelagnum, Knud E Hansen, eru á staðnum í allari byggitíðini og hava eftirlitið

Skipið, sum Bjarni Djurholm er til reiðar at byggja, kostar 275 milliónir, men tað er ikki teknað enn.



# Neistin 70 ár

**Elsta hondbóltsfelagið í landinum fyllir 70 ár í dag, mikudagin**

Flestum kunnugt hevur hondbólturin í nógv ár havt fastatøkur á okkum føroyingum. Elsta av mongu hondbóltsfeløgunum kring landið, hevur nú 70 ár á baki, og einki er at ivast í, at føðingardagsbarnið er vaksið nógv, síðani føðingina í 1931.

Í dag er Neistin helst størsta hondbóltsfelagið í landinum, har hópur av børnum og vaksnum hava sína dagligu gongd. Antin sum íðkarar, venjarar ella stuðlar av ymsum slag.

## Halda dagin

Ein slíkur dagur skal sjálvandi haldast, og tí hevur felagið nú boðið vinum, kenninugm og stuðlum í føðingardag hjá sær.

Hetta verður í Ítróttahøllini á Hálsi í dag, mikudagin, kl. 17.00, og føðingardagsbarnið hevur sjálvandi bæði bollar, kakao, lagkøku og annað gott at bjóða gestunum.